# Nøvn

## Føðingar



*2. juli fingu Miriam av Reyni og Jóannes Egholm, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3925 gr. Stóribeiggin eitur Jens Jóannesarson av Reyni.*

11. juli fingu Christina Torpsgaard Bech og Pætur Joensen, Gram, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3610 gr.

14. juli fingu Rannvá og Eystein í Løðu, Bøur, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3980 gr.

17. juli fingu Hilda Christiansen og Jóhan Hendrik W. Jørgensen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3000 gr.

17. juli fingu Tóra Johansen og Collins Okpara, Strondum, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4250 gr.

18. juli fingu Elin Horn og Jákup Poulsen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 4055 gr.

18. juli fingu Joan Jógvansdóttir og Ási Mikkelsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3880 gr.

20. juli fingu Annelisa Justinussen og Jákup Jóhannes Dalsá, Leirvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 5100 gr.

# Janne gevst í Fírskúlanum við Hoyvíkstjørn



Tað er við sorgblídni, at vit siga farvæl við Janne, nú hon hevur verið leiðari í Fírskúlanum við Hoyvíkstjørn í heili 25 ár, sum eru uml. 2/3 av hennara tænastutíð sum lærari. Sera væl hildni, væl rikni og væl virkandi skúlin stendur eftir hana sum ein sannur varði, ið hon kann gleðast um og vera errin av. Hon hevur á sera hegnisligan hátt megnað at fáa skúlan til at virka avbera væl og menna hann til nútíðar- og framtíðar samfelagið – til krøv og avbjóðingar í samtíðini, samstundis sum skúlin er væl rótfestur í fortíðar siðaarvi og í føroyskari mentan.

Fírskúlin er ein av teimum út við 6.000 skúlunum, sum altjóða Adventistasamkoman rekur um allan heimin. Skúlavirksemið teirra byrjaði longu í 1874, og Fírskúlin við Hoyvíkstjørn, ið fyrr varð kallaður Adventistaskúlin, byrjaði í 1966. Skúlin er 44 ára gamal og harvið elsti fírskúli í landinum. Janne hevur sostatt verið skúlastjóri í meira enn helvtini av livitíð skúlans, og lítið er at taka seg aftur í, at skúlin eftir familjuna hevur verið hennara stóra lívsuppgáva.

Janne Shantz Johnsson er fødd 16. mai 1948 í Århus, dóttir Hans Jørgen Schantz úr Holstebro og Carlu Nestved úr Køge. Janne var gift Kristinni Johnsson úr Tórshavn, sum eftir stutta sjúkralegu andaðist fyri tveimum árum síðani. Tey eiga børnini Tatjanu, Natashu, Teresu, Mariu og Julian, sum m.a. er kendur frá føroyska fótbóltslandsliðnum. Janne tók læraraprógv á Jelling Seminarium í 1972 og hevur verið lærari í Vejlefjordskolen í Daugård 1972-85 og síðan 1985 verið stjóri í Fírskúlanum.

Janne hevur gingið upp í uppgávuna og skúlan við lív og sál. Tann fyrsta at møta um morgunin og altíð hon, ið gekk undan. Spardi ikki seg sjálva, men var tann, ið luttók og vísti vegin og heldur gekk fammanfyri og eina míl afturat. Hon hevur verið ótroyttilig at eggja, stuðla og motivera, men eisini at taka atlit til støður og umstøður hjá øðrum og fáa alt at ganga upp í eina hægri eind. Hon var tann, ið bar kaffi út í skúlagarðin til garðvaktina, og altíð var hon í líka stóran mun tænari sum leiðari. Hon hevur so at siga verið tann fyrsta millum líkamenn. Kundi hon geva, kundi hon eisini krevja, og hon segði hart, hvat ið hon vildi hava, og hvussu hon vildi hava tað, men hon legði eisini upp til dialog, og gav tær fult frælsi og fulla ávirkan at útinna uppgávurnar og fremja verkið. Janne var og er úrslitssøkin og miðsavnað í arbeiðinum.

Janne dámdi líka so væl at undirvísa sum at leiða. Henni dámdi at vera saman við næmingunum, at fortelja, formidla, greiða frá og gera næmingarnar tilvitaðar um mangt og hvat. Hennara spurnarkappingar eru legendariskar, og hon fekk næmingarnar at vera áhugaðar í søgu og samtíð, í samfelagnum og í almennari vitan, eins og í enska málinum, ið hon tosar raðið eftir at hava búð í London sum barn. Í mong ár hevur Janne spælt blokkfloytu saman við næmingunum, og vit eru mong, ið hava notið frálíku framførslurnar til skúlaveitslurnar og til jólahaldini í Kirkjuni. Janne hevur stórt námsfrøðiligt innlit og hegni og hevur verið sera góð í ráðum hjá børnum, foreldrum og lærarum. Hon er altíð góð og vinalig at koma til, og tú fert altíð ríkari aftur frá henni.

Vit fara at sakna hennara meiningar og virði, hennara áræði og dirvi, hennara mót og visiónir, hennara áhaldni og treiskni, hennara umsorgan og uppmerksemi, og hennara skemtingarsemi, hýr og góða lag. Vit eru vís í, at aðrar spennandi avbjóðingar liggja fyri framman hjá Jannu at luttaka í. Vit ynskja Janne góða eydnu framyvir og takka henni hjartaliga fyri árini í Fírskúlanum við Hoyvíkstjørn.

**Starvsfelagarnir í Fírskúlanum við Hoyvíkstjørn – Bergur Godtfred**

# Merkisdagar

### Gullbrúdleyp

Fríggjadagin 23. juli hava Hergerð og Eiler Samuelsen bakari Klaksvík gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í K.F.U.M & K í Klaksvík frá kl. 19 har øll eru hjartaliga vælkomin.

### Gullbrúdleyp

Fríggjadagin 23. juli eru liðin 50 ár síðani Katrin og Alex Sólstein vórðu hjúnavígd í Klaksvíkar kirkju. Tey eru burturstødd gullbrúdleypsdagin, tí saman við dreingjunum og familjum teirra endurtaka tey brúdleypsferðina til Noregs fyri fimmti árum síðani.

### Silvurbrúdleyp

27. juli hava Krisfinn og Maria Christiansen, Klaksvík, verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

### Silvurbrúdleyp

Mikudagin 8. september hava Alith og Hilmar Djurhus Strendur silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin fríggjadagin 10. september kl. 18 í bygdarhúsinum á Strondum. Tey ið ynskja at gleðast saman við okkum verða vinarliga biðin um, at siga frá innan 24. august á tlf. 448534 ella 224635.

### 90 ára føðingardagur

Leygardagin 24. juli heldur Elisabeth Olsen sín 90 ára føðingardag á Sandáarbreyt 7. Tey, ið vilja heilsa upp á hana, eru hjartaliga vælkomin millum kl. 11 og 15.

### 90 ára føðingardagur

Mánadagin 26. juli verður Hanna Ziska, Klaksvík, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin á Sjómansheiminum í Klaksvík kl. 18 sama dag. Tey, ið vilja heilsa upp á Honnu, eru hjartaliga vælkomin.

### 85 ára føðingardagur

Ólavssøkuaftan 28. juli verður Otto Sørensen, Tórshavn, 85 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Otto føðingardagin, eru hjartaliga vælkomin í Tórugøtu 27 (hjá Sunnvu) 28. juli millum kl. 10 og 14.

### 75 ára føðingardagur

Sunnudagin 1. august fyllir Helgir Thomsen í Hvalba 75 ár. Tey, ið vilja gleða Helgir á degnum eru vælkomin heim til hansara millum kl. 14 og 18.

### 70 ára føðingardagur

23. juli fyllir Anna Glyvradal, Glyvrar, 70 ár. Vælkomst verður í sjókafeiini í Rúnavík 24. juli kl. 18.